Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit Emilsson Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Foreldramyndugleikalógin

Spurningar:

1. Hvussu langt eru fyrireikingarnar komnar við at dagføra foreldramyndugleikalógina, herundir at veita felags foreldramyndugleika millum mammu og pápa?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um broytingar í foreldramyndugleikalógini?

Viðmerkingar:

Tað eru nógv foreldur í Føroyum, sum hava trupulleikar ella avbjóðingar við rættindum hjá barninum og felags foreldramyndugleika millum mammu og pápa, herundir hvørji rættindi og skyldur eru galdandi.

Í t.d. Danmark er lóggávan á hesum økinum dagførd fyri langari tíð síðan.

Sambært samgonguskjalinum hevur samgongan sett sær hetta fyri: “Foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, soleiðis at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa, og rættindi og skyldur verða staðfest.”

Nú er ein rúm tíð fráliðin, síðan samgonguavtalan varð undirskrivað, og vit eru skjótt við at enda triðju tingsetuna, og enn er onki lógaruppskot hesum viðvíkjandi lagt fyri Løgtingið.

Tað hevur týdning at vita, nær hesin samfelagsbólkur kann vænta sær meira skipað og dagførd viðurskifti. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 1. februar 2022

Johan Dahl